## … ÍF Føroyar hevur ikki havt betri grundvøll




Ovi Brim úr B68, Emil Nolsøe Leifsson, uppvaksin í HB og Heini S. Kristiansen frá Skála, allir á sama beinki í ÍF Føroyum

Mynd: Rólant Waag Dam

Hetta sama er galdandi fyri næstbesta lið felagsins. Teir hava somuleiðis víst góðar taktir í venjingardystunum higartil, og vónirnar til kappingarárið hjá teimum eru ógvuliga góðar.

### Fyrsta floks leikarar í felagnum

Av teimum 60 leikarunum, sum hava víst seg til venjing higartil í ár, eru fleiri leikarar, sum hava drúgvar royndir í bestu føroysku fótbóltsdeildini. Rókur av Fløtum Jespersen, Niels Joensen, Emil Nolsøe Leifsson, Jóhan V. Gunnarsson, Rúni Rasmussen, Ovi Brim og Erling Fles eru nakrir teirra.

Hóast fyrsta floks leikarar, onkur er enn tá skrásettur fyri onkran A-landsdyst, verður ikki vant meiri enn tvær ferðir um vikuna. Venjararnir virða, at felagið er mannað við leikarum, sum fyrst og fremst eru í Keypmannahavn fyri at fáa eina útbúgving. Slíkt krevur tíð og orku, og tað skulu leikararnir eisini sleppa at raðfesta.

### Savnandi samleiki fyri føroyingar

Hóast hetta einans er annað árið, at Eyðun Hentze Højgaard roynir seg sum venjara í felagnum, so er hann kortini gamal í garði í ÍF Føroyum. Hann hevur roynt seg sum leikara, nevndarlim og eisini sum formann eitt skifti. Harumframt spælir hann eisini hondbólt við hondbóltsdeild felagsins.

Tískil ivast hann ikki, tá hann verður spurdur, um týdningin av einum felagi sum ÍF Føroyar.

– Tað hevur stóran týdning, eingin ivi skal vera um tað. Føroyingar hava tørv á at vera føroyingar, tá teir eru í Danmark. Og hjá teimum, sum ikki búgva á Øresund kollegiinum, er ÍF Føroyar einasta føroyska íkasti í gerandisdegnum. Tí søkja leikarar til felagið, metir Eyðun Hentze Højgaard.

### Harmast um føroyskt flytingarvindeyga

Leikandi venjarin fegnast eisini um mongu leikararnar, sum søkja til ÍF Føroyar og hava vant við felagnum í ár. Tað gera mongu feløgini heima í Føroyum ivaleyst eisini, tí tey vita, at um teirra leikarar eru partur av besta liðnum hjá ÍF Føroyum, so eru teir rímiliga væl fyri, um tey ætla at brúka teir, tá hesir koma heim at halda summarfrí frá lesnaðinum. Men nú er ikki heilt so lætt hjá leikarunum at flyta millum ÍF Føroyar og føroyska felag teirra.

Eins og í Føroyum, so krevst eisini eitt leikaraloyvi fyri at spæla fótbólt í Danmark. Um leikarin ætlar at spæla við ÍF Føroyum, tá hann kemur niður, krevst at leikaraloyvið verður flutt til ÍF Føroyar.

Men tá leikarin so kemur heim í summarfrí, so kann nýggi flytingargluggin í Føroyum spæla leikarunum eitt puss. Hesin forðar nevniliga fyri, at leikararnir kunnu flyta leikaraloyvi heim, tá teir ynskja tað. Flytingargluggin í Føroyum er bara opin í fýra vikur í summar, og tá kunnu leikarar koma í ta óhepnu støðu, at teir ikki sleppa á vøllin tann fyrsta mánaðin, teir eru í Føroyum, tí eitt pappír forðar teimum í hesum.

– Tað er serstakliga óheppið, tí vit kunnu illa brúka leikarar, sum ikki hava leikaraloyvi liggjandi hjá okkum. Hinvegin skilja vit eisini væl spælarar, sum vilja umboða sítt felag í Føroyum í summarsteðginum, so støðan er ógvuliga keðilig og rakar okkum meint, harmast Eyðun Hentze Højgaard.

**Rólant Waag Dam**
**rolant@sosialurin.fo**